# Endin skræddur av Molanum

**Í gjárkvøldið tók eitt russiskt tangaskip í Molan, og ein betongstabbi á stívliga 80 tons varð skræddur av, umframt at endin á sjálvari keiini fekk nakað av skaða**

SIGLING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var eitt russiskt tangaskip, sum í gjárkvøldið var á veg út úr havnini, sum tók í endan á sjálvum Molanum. Har stendur vanliga ein betongstabbi stoyptur niður á. Hesin er klæddur við gummifendarum og røkkur millum tveir og fýra metrar upp um vatngangin. Betongstabbin er settur har fyri at verja fyri og minka um stoytin, tá skip sum koma úti frá, taka í Molan. Keiin og lendið innanfyri taka ímóti trýstinum.

Í gjárkvøldið var tað eitt skip, sum skuldi út frá havnini, ið tók í Molan. Og tá einki er, ið kann halda ímóti uttanfyri betongstabban, koppaði hesin á bláman, samstundis sum endin á keiini fór nakað. Álvur Kristiansen, verkfrøðingur á Havnarskrivstovuni, sigur tó, at sjálv konstruktiónin á keiini ikki fekk nakran skaða.

Betongstabbin, ið er 34 rúmmetrar og vigar stívliga 80 tons, liggur nú á havsins botni. Arnbjørn Kristiansen sigur, at nú verður ein nýggjur stabbi helst gjørdur, soleiðis at tann nú verjuleysi Molin, aftur kann taka ímóti stoyti frá skipum, ið koma ov nær.





*Gummiklæddi betongstabbin, sum skal verja fyri og minka um stoytin, tá skip sum koma úti frá, taka í Molan, liggur nú á havsins botni, umframt at sjálvur endin á keiini fekk nakað av skaða*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men út á seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri og um kvøldið regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 8 og 12 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 33 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1023 hPa. í útsynning úr Íslandi viknar. Eitt lágtrýst, 997 hPa. yvir Írlandi fer eystureftir.



**Í dag:**
Ein hátrýstryggur yvir Íslandi verður yvir Føroyum leygarnáttina. Eitt lágtrýst sunnan fyri Hvarvið kemur hendavegin

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/07 kl. 06[00] – 08/07 06[00]. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 01/07 kl. 06[00] – 02/07 06[00].
Avfallið higartil í juli: 0 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli Mánin næstur jørðini
10. juli Fyrra kvarter
14. juli Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. juli | 0:45 | 13:19 | - | 12:19 | 0:00 | 12:34 | 2:45 | 15:19 | 3:45 | 16:19 | 11:34 | - | 10:34 | 23:09 | 1:00 | 13:34 | 2:00 | 14:34 | 0:30 | 13:04 | 1:45 | 14:19 |
| 11. juli | 1:54 | 14:29 | 0:54 | 13:29 | 1:09 | 13:44 | 3:54 | 16:29 | 4:54 | 17:29 | 0:09 | 12:44 | 11:44 | - | 2:09 | 14:44 | 3:09 | 15:44 | 1:39 | 14:14 | 2:54 | 15:29 |
| 12. juli | 3:04 | 15:26 | 2:04 | 14:26 | 2:19 | 14:41 | 5:04 | 17:26 | 6:04 | 18:26 | 1:19 | 13:41 | 0:19 | 12:41 | 3:19 | 15:41 | 4:19 | 16:41 | 2:49 | 15:11 | 4:04 | 16:26 |
| 13. juli | 3:48 | 16:11 | 2:48 | 15:11 | 3:03 | 15:26 | 5:48 | 18:11 | 6:48 | 19:11 | 2:03 | 14:26 | 1:03 | 13:26 | 4:03 | 16:26 | 5:03 | 17:26 | 3:33 | 15:56 | 4:48 | 17:11 |
| 14. juli | 4:34 | 16:58 | 3:34 | 15:58 | 3:49 | 16:13 | 6:34 | 18:58 | 7:34 | 19:58 | 2:49 | 15:13 | 1:49 | 14:13 | 4:49 | 17:13 | 5:49 | 18:13 | 4:19 | 16:43 | 5:34 | 17:58 |